# Stórsligin konsert í Kelduni

Konsertin við Rebeccu St. James var í Kelduni mikukvøldið. Tað var eitt stórt upplivilsi at hoyra tey spæla. Móti endanum av konsertini var ein lovsangsløta, har ið øll sungu við



*Tríggjar songkvinnur framførdu sínar sangir. Móti endanum av konsertini sungu tær allar saman til eina lovsangsløtu. Frá vinstru eru tær: Charmaine Carrasco, Rebecca St. James og Sarah Brendel. Kvinnan longst til høgru er back-up sangari hjá Rebecca St. James*

KRISTILIG KONSERT

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Um 800 fólk vóru møtt til konsertina mikukvøldið. Hon byrjaði nakrar minuttir ov seint (sum øll føroysk tiltøk gera) við at fyriskiparnir komu á pallin og greiddu áhoyrarunum frá skránni. Teir lovaðu eitt óvæntað innslag undir konsertini, sum teir tó ikki vildu siga meira um tá.

Fyrst kom Sarah Brendel, sum eisini skal framføra á summarfestivalinum, á pallin. Hon byrjaði við at syngja ein sang hjá Petra, og serliga teimum eldru áhoyrarunum dámdu hann væl, tí at tey flestu kenna Petra. Sarah tosaði enskt við einum sera eyðkendum týskum tóna. Hon treivst sera væl á pallinum við sínum gittara.

Røddin hjá Sarah kom veruliga til sín rætt, tí at tað var einans gittarin, sum spældi undir. Hon sang sera reint, men kortini ópolerað. Hon hevur ein ráan country-melodiøsan stíl, sum rakti beint í hjørtuni hjá áhoyrarunum. Sarah varð ikki minni væl dámd, tá ið hon rósti føroyingum og tí vakra landi, sum vit búgva í.

## Eitt triðja navn

Eftir at Sarah var liðug at syngja, vórðu ljósini sløkt meðan Andrew Djurhuus bjóðaði tí triðja navninum vælkomnum upp á pallin. Eingin visti, hvør tað var, sum nú skuldi syngja. Andrew fortaldi, at hon eitur Charmaine Carrasco og er úr Avstralia. Tá ið ljósini tendraðust, kom hon á pallin dansandi og hoppandi til ein sera góðan popputan sang.

Eftir tann fyrsta sangin nýtti Charmaine eisini høvið til at fortelja eitt sindur um seg sjálva. Serliga teir friðaligu sangirnir hjá henni fóru beint inn í hjartað, tí at hon sang framúr væl. Charmaine var eisini backup-voice hjá Rebeccu St. James, og hon hevði teir somu tónleikarnar sum Rebecca.

## Livdi upp til vónirnar

Høvuðsnavnið á konsertini var uttan iva Rebecca St. James. Hon trein á pallin við einum braki, og alt orkestrið hjá henni var við. Tónleikaliga er hon í serflokki, og tónleikarnir og stuðulsrøddirnar eru framúr. Umframt tað tónleikaliga, so hevur Rebecca eisini eina sera sterka persónligheit, sum stóð sterkt fram á konsertini. Ímillum mestsum hvønn sang tosaði hon um innihaldið í sanginum, og hvat hann hevur at týða fyri hana.

Rebecca er ein kvinna, sum ikki einans ynskir at spæla tónleik fyri at spæla tónleik. Á heimasíðuni hjá henni stendur, at hon kennir sína sangyrkisleið sum eina tænastu fyri Gudi. Millum annað er Rebecca ein av teimum fremstu talsfólkunum fyri ein amerikanskan felagsskap, sum heitir á ung um at bíða við kynslívinum, inntil tey eru gift. Hetta greiddi hon eisini frá undir konsertini, og í tí sambandi sang hon ein sang um evnið, sum kallast "Wait For Me".

Móti endanum av konsertini, fór hon at syngja kendar lovsangir, og áhoyrarnir sungu við. Sarah Brendel kom aftur á pallin, so allar tríggjar songkvinnurnar sungu saman. Tað vakti mikla frøi hjá áhoyrarunum. Nú líktiskt konsertin meira einum møti, og Rebecca bað ímillum sangirnar. Hetta var ein hóskandi endi uppá konsertina og vísti greitt, hvat hesar kendu stjørnurnar í veruleikanum vildu bera fram á konsertini: Tær vildu greiða áhoyrarunum frá um teirra trúgv á Jesus.

## Góðir áhoyrarar

Rebecca segði í stuttari viðmerking eftir konsertina, at tað merkist veruliga á føroyingum, at kristindómurin enn hevur so stóran týdning í okkara landi. Áhoyrarnir skikkaðu sær sera pent, og hóast stemningurin var sera góður – ja næstan euforiskur –, so var tað eingin trupulleiki at fáa tónleikarnar niður av pallinum, tí at eingin trokaði ella var nærgangandi móti hesum kendu persónum. Tær eru allar takksamar fyri at fáa møguleikan at spæla í Føroyum.

Samanumtikið kann sigast, at konsertin var sera væleydnað. Rebecca St. James livdi upp til vónirnar, sum fólk høvdu til hana. Allar songkvinnurnar vóru sera natturligar og høvdu gott samband til áhoyrarnar. Fyriskiparnir frá Gjamma hava veruliga gjørt eitt gott arbeiði.



*Rebecca St. James sang sangirnar sera inniliga. Teksturin í hennara songum hevur sera nógv at týða. Hon greiddi frá innihaldinum ímillum mestsum hvønn sang*